## Vælvitjað fyritøka

Herfyri fingu fyritøkurnar undir Rodmundi Nielsen í Saltangará, nýtt navn. Tær eita nú Borg. Talan er um Højgaards Handilsvirki, Klement Petersen, Klaksvíkar Timburhandil og KN, sum stendur fyri Knudsen og Nielsen. Borg hevur deildir í Runavík, Saltangará, Fuglafirði og Klaksvík. Í sambandi við navnabroytingina og nýggja samleikan høvdu allar deildirnar hjá Borg opid síðasta leygardag frá klokkan 08-18. Hendan dagin bjóðaði Borg øllum til eitt stórt familjutiltak. Umleið 1800 fólk vitjaðu deildirnar, og ein rúgva av børnum komu at lurta eftir Trølla Pæturi, Ommuni og Ommudiddi.



## Tannrøkt í felag

14. september 2007 var felag stovnað fyri tannrøktarar. Felagið fekk heitið Tannrøktarafelagið. Felagið skal virka fyri fakligari førleikamenning og lønarligu áhugamálunum hjá limunum. Í felagnum eru 25 limir, sum starvast bæði í privatari og kommunalari tannrøkt. Í nevndini sita: Herborg Foldbo, Berghild Gullaksen, Jonnhild Reynholdsdóttir, Laila Nielsen og Ada Kristina Petersen.

# Ferðavinnan stríðist við vánaligar umstøður



*Ein bólkur samansettur av høvuðsaktørunum í ferðavinnuni finst at vánaligari kunning til útlendsk ferðafólk og sera vánaligar kamping- og tjaldingarmøguleikar í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ein tann størsti trupulleikin, sum føroyska ferðavinnan hevur at stríðast við, er vánalig kunning til ferðafólk og møguleikarnir hjá ferðafólkunum sjálvum at kunna seg. Harafturat eru serliga kamping- og tjaldingarmøguleikarnir út av lagi vánaligir**

FERÐAVINNA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Størsta avbjóðingin í ferðavinnuni nú er at fáa ferðafólkastreymin støðugari alt árið. Hetta heldur ein bólkur samansettur av høvuðsaktørunum í ferðavinnuni, sum Tórshavnar kommuna hevur sett at lýsa ferðavinnuna og at gera tilmæli um, hvussu hendan vinnan kann mennast.

Bólkurin vísir á, at um ferðavinnan í kommunini skal mennast, so er brúk fyri ógvuliga fjøltáttaðum tiltøkum. Summaruppgávur kunnu verða loystar við stuttum skotbró og við lítlum arbeiði, meðan aðrar taka langa tíð, skulu ígjøgnum drúgt fyrireikingararbeiði og kunnu bara verða loystar við støðugum arbeiði í mong ár.

Í summum førum er talan um varandi arbeiði við stórari orku í fyrstani, men síðan sum arbeiði, ið javnar má endurskoðast.

Tiltøkini, sum bólkurin heldur vera neyðug at seta í verk, um so er, at ferðavinnan skal vaksa, fullmennast og gerast ein av okkara høvuðsvinnum, far at kosta ógvuliga ymiskt.

Eisini er ymiskt, hvør hevur ábyrgdina av teimum arbeiðsuppgávum, sum bólkurin hevur tikið fram um aðrar. Í nøkrum føri er greitt, hvar ábyrgdin liggur; ávikavist hjá landi, kommunum ella vinnuni.

Niðurstøðan hjá bólkinum, ið er samansettur av umboðum fyri Greengate, Smyril Line, Vinnuhúsið, Hotel Føroyar og Hotel Tórshavn, Atlantsflog, Norðurlandahúsið og Tórshavnar kommunu, er, at føroyska ferðavinnan dregist við trupulleikar av, at kunningin ikki er nóg góð.

Stundum er hetta kunning á ymsum plássum, ófullfíggjað málslig kunning til ávísar ferðafólkabólkar og vánaligar ella ódagførdar heimasíður hjá bæði privatum og almennum aktørum í ferðavinnuni. Hetta gevur eina vánaliga mynd av Føroyum og ein varhuga av, at tilboðini er nógv færri, enn tey í veruleikanum eru. Fleiri heimasíður eru bara á føroyskum, sum útlendingar sostatt onki fáa burturúr.

Bílleggingarskipanir online eru eisini ein stór mangulvøra, vísir bólkurin á. Bæði at kunna bíleggja ferðina og leggja hana til rættis heimanífrá; altso áðrenn ferðin byrjar.

Ein annar trupulleiki er atgongdin til internet hjá teimum ferðandi. Sum er, er bert á nøkrum fáum gistingarhúsum, at til ber at sleppa á netið eftir afturlatingartíð um kvøldið. Hetta eigur at verða broytt, so ferðafólk hava møguleika at logga seg á alla tíðir á døgninum.

### Sera vánalig kampingpláss

Ferðafólkini verða eisini alt ov lítið kunnaði, tá tey koma til landið. Bæði á flogvøllinum og á bryggjuni í Havn. At kunning vantar ger eisini um seg, bæði tá Norröna kemur inn, og onnur ferðamannaskip koma á Havnina.

Úrslitið er, at ongin ella vánalig samskipan er millum tilboðsveitarar og flutningsfeløgini ella cruiseveitararnar. Eisini er vantandi skelting í Havn og úti um landið ein trupulleiki.

Kampingplássini eru vánalig. Ikki minst tað í høvuðsstaðnum úti við Strond.

Bólkurin staðfestir, at eitt nútímans tjaldingar- og kampingpláss á høgum støði við øllum hentleikum, sum til dømis grillstaði og spæliplássi í einum náttúruvøkrum umhvørvi, hevði bøtt nógv um umstøðurnar, sum vit hava at bjóða teimum nógvu ferðafólkunum, ið ferðast til Føroya á hendan hátt. Nógv av ferðafólkunum eru júst av slíkum slagi.

Umstøðurnar, sum Tórshavnar kommuna bjóðar teimum, eru á einum ógvuliga lágum altjóða stigi, og úrslitið er, at steðgurin í Føroyum oftani gerst ein vánalig uppliving. Tí fáa Føroyar hvørt einasta ár nógva neiliga umtalu úti í heimi, orsakað av vánaligu kamping- og tjandingarmøguleikunum.

Bólkurin aftanfyri tilmælið vísir á, at hesi ferðafólk leggja nógv meira eftir seg, enn tað sigst, tey gera. Tí heitir bólkurin á Tórshavnar kommunu um at bøta um karmarnar hjá hesum ferðafólkabólki.